# Heilsu- og innlendismálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 27.01.2017
Mál nr.: 17/00100
Málsviðgjørt: JTN/PJ

**Løgtingsmál nr. xx/2016: Uppskot til broyting í løgtingslóg um jarðhitaskipanir**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um jarðhitaskipanir**
(el riknar hitapumpuskipanir)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 22 frá 16. mars 2012 um jarðhitaskipanir, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Heiti á løgtingslógini verður orðað soleiðis:
**"Løgtingslóg um el riknar hitapumpuskipanir".**

**2.** Í § 1, stk. 1 verður "jarðhitaskipanum" broytt til: "hitapumpuskipan, bygd á hitapumpur".

**3.** § 1, stk. 2 verður strikað og í staðin verður sett:
"*Stk. 2.* Hitapumpur, minni enn 4 kW, eru undantiknar ásetingunum í hesi lóg, sí tó §§ 6 a, stk. 3 og 4 og 9, stk. 3. ".

**4.** Í § 2 verður sum nýtt nr. 1 sett:
"Hitapumpuskipan: Skipan við el riknari hitapumpu, ið tekur hita úr jørð, vatni, sjógvi ella luft at hita luft og/ella vatn í sethúsum og bygningum.".
Nr. 1, 2 og 3 verða eftir hetta nr. 2, 3 og 4.

**5.** § 2, nr. 4 verður orðað soleiðis:
"Vatnrætt jarðhitaskipan: Jarðhitaskipan, har hiti verður savnaður gjøgnum vatnrætt niðurgrivnar slangur, sum liggja í lendinum við bygningin.".

**6.** Í § 5, stk. 1, § 7, stk. 2 og í § 9, stk. 5, 2. pkt. verður "Jarðfeingi" broytt til: "Umhvørvisstovuni".

**7.** Í § 5, stk. 2 verður "Jarðfeingi" broytt til: "Umhvørvisstovuna".

**8.** Í § 6, stk. 1, nr. 3 verður "reglur til útbúnað" broytt til: "útbúnaður".

**9.** Aftan á § 6 verður sett:

"**§ 6 a.** Áðrenn hitapumpuskipanir, sum ikki eru jarðhitaskipanir, verða settar upp, skal góðkendur installatørur, eigarans vegna, útgreina hitatørvin, dimensionera hitaskipanina og útgreina nyttuna.
*Stk. 2.* Oyðublað við upplýsingum eftir stk. 1 og um slag og stødd á hitapumpu, skal latast Umhvørvisstovuni til kunningar, áðrenn farið verður undir at seta hitapumpuskipanina upp.
*Stk. 3.* Oyðublað við upplýsingum um slag og stødd á hitapumpu, minni enn 4 kW, skal latast Umhvørvisstovuni til kunningar, áðrenn hitapumpuskipananin verður sett upp.
*Stk.* 4. Tað er ábyrgd eigarans at lata Umhvørvisstovuni upplýsingar eftir stk. 2 og 3.
*Stk. 5.* Tá onnur hitapumpuskipan enn jarðhitaskipan verður tikin úr nýtslu, skal eigarin boða Umhvørvisstovuni frá hesum innan 30 dagar eftir, at slík skipan er tikin úr nýtslu."

**10.** Í § 7, stk. 1, § 9, stk. 1 og stk. 5, 1. pkt. og § 14, stk. 2 verður "Jarðfeingi" broytt til: "Umhvørvisstovan".

**11.** Í § 8, nr. 2 verður "Jarðhitaskipanin" broytt til: "jarðhitaskipanin".

**12.** Í § 9, stk. 1 verður "jarðhitaskipanum" broytt til: "hitapumpuskipanum".

**13.** Í § 9, stk. 1, nr. 2, stk. 4 og stk. 5 verður "ávíkavíst" broytt til: "ávikavist".

**14.** Í § 9, stk. 1, nr. 2 og stk. 4 verður "jarðhitaskipan" broytt til: "hitapumpuskipan".

**15.** § 9, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Bert góðkendur installatørur av hitapumpu kann installera hitapumpu í hitapumpuskipan. Hetta er eisini galdandi fyri hitapumpur minni enn 4 kW.".

**16.** Heitið á kapitli 6 verður orðað soleiðis:
"**Rakstur av hitapumpuskipanum og burturtøka av jarðhitaskipanum**".

**17.** § 12, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Hitapumpuskipanin skal verða eftirkannað av góðkendum installatøri av hitapumpuskipanum í minsta lagi eina ferð í hvørjum kalendaraári, tó undantikið í tí kalendaraárinum, tær eru tiknar í nýtslu.".

**18.** Í § 12, stk. 2 verður "jarðhitaskipanini" broytt til: "hitapumpuskipan".

**19.** Í § 12, stk. 3 verður "jarðhitaskipanini" broytt til: "hitapumpuskipanini".

**20.** Í § 14, stk. 1 verður "í vinnumálum" strikað.

**21.** Í § 15, stk. 1 verður aftan á "§ 3," sett: "§ 6 a, stk. 2. 3 og 5,"

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

Í lógini um jarðhitaskipanir er ásett, at installatørar og brunnborarar skulu vera góðkendir (autoriseraðir). Eisini tá aðrar hitapumpuskipanir skulu setast upp, eigur arbeiðið at verða gjørt av installatørum, ið hava neyðuga førleikan og eru góðkendir.

Tað verður eisini mett gagnligt frameftir at hava gott hagtalsgrundarlag fyri upphitingina av sethúsum og bygningum. Verandi áseting í lógini tryggjar, at Umhvørvisstovan fær upplýsingar um jarðhitaskipanir, ið verða settar upp og um tær, sum verða tiknar út nýtslu. Í hesum lógaruppskotinum verður lagt upp til, at Umhvørvisstovan eisini fær hesar upplýsingar um aðrar hitapumpuskipanir.

Lógaruppskotið ásetir krøv um góðkenning av installatørum, ið kunnu seta upp hitapumpur. Í stóran mun er hetta ein víðkan av ásetingum, sum longu galda fyri jarðhitaskipanir.

Sambært orkupolitikki landsstýrisins skal í minsta lagi helvtin av upphitingini av sethúsum og bygningum verða grundað á varandi orkukeldur í 2025.

Væntandi verða hitapumpur ein týðandi partur at røkka orkupolitiska málinum. Fyri at viðurskiftini viðvíkjandi hitapumpum eru so skynsom sum møguligt bæði fyri brúkaran og fyri samlaðu orkunýtslu landsins, er umráðandi, at bæði útgerð, uppseting og viðlíkahald verður á høgum støði. Hetta skal tryggjast við krøvum til hitapumpurnar (útgerð) og til uppseting og viðlíkahald (installatørar). Í bygningskunngerðini, sum kom í gildi 1. januar 2017, eru ásetingar um m.a. orkukrøv til hitapumpur.

Umframt at hitapumpur skulu lúka orkukrøv, er eisini týdningarmikið, at installatørarnir hava neyðugu førleikarnar, og verður tí í hesum uppskoti lagt upp til, at teir skulu verða góðkendir. Fyri at fáa góðkenning sum installatørur, skal umsøkjarin hava luttikið á skeiði, ið gevur neyðugar førleikar til uppgávuna, sum er at útgreina hitatørvin, dimensionera hitapumpuskipanina, meta um nyttuvirðið og installera skipanina.

Lógaruppskotið leggur eisini upp til, at Umhvørvisstovan fær upplýsingar um hitapumpur, ið verða uppsettar til hagtalsbrúk.

Í uppskotinum verður lagt upp til, at ikki heilt somu krøv verða sett hitapumpum minni enn 4 kW. Teirra partur av samlaðu orkunýtsluni verður helst lítil. Tá tær heldur ikki eru so kostnaðarmiklar, hevur tað ikki í sama mun týdning at tryggja eigaran, sum tá talan er um størri hitapumpur. Harumframt kann tað hava við sær, at færri fáa sær hesar hitapumpur, tí kostnaðurin av árligum eftirlitum er lutfalsliga ov stórur í mun til nyttuna. Skotið verður tí upp, at hitapumpur minni enn 4 kW eisini skulu installerast av góðkendum installatørum, men at tað ikki krevst útgreining av dimensionering, nyttuvirðið v.m., eins og tað heldur ikki verður kravt, at árligt eftirlit skal verða gjørt av hesum pumpunum. Tað er tó sjálvandi møguligt hjá teimum, ið ynskja tað, at fáa uppfylgjandi eftirlit. Eisini er tað so, at byggikunngerðin, ið kom í gildi 1. januar 2017, ásetir, at einans góðkendar hitapumpur kunnu setast upp uttan mun til stødd.

**1.5 Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið er gjørt saman við Umhvørvisstovuni og er sent til hoyringar hjá Sev, Vinnuhúsinum og Føroya Kommunufelag.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur
Mett verður, at uppskotið ikki hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingaligar avleiðingar fyri land og kommunur
Skotið verður upp, at Umhvørvisstovan skal viðgera umsóknir um endurrindan av meirvirðisgjaldi og um góðkenning av installatørum. Nakað av arbeiði verður av hesum, men tað kann væntandi gerast við verandi arbeiðsmegi.

Taks umsitur útgjald av meirvirðisgjaldinum. Í uppskotinum verður lagt upp til, at tað verður Umhvørvisstovan, ið viðgerð og váttar umsóknir, áðrenn Taks fær tær. Tað verður tí helst avmarkað, hvussu stóra arbeiðsbyrðu hetta fer at hava við sær hjá Taks.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið leggur upp til, at tey, ið seta hitapumpuskipanir upp, mugu taka skeið í hesum fyri at verða góðkend. Skeiðini kunnu takast í Danmark og varir nakrar dagar.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Mett verður, at uppskotið ongar beinleiðis avleiðingar hevur fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður, at uppskotið ikki hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Mett verður, at uppskotið ikki hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Eingir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru.

### 2.9. Marknaforðingar
Mett verður, at uppskotið ikki hevur við sær nakrar marknaforðingar.

### 2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur við sær, at tað verður revsað við bót, um eigarin av einari hitapumpuskipan, við vilja ella við grovum ósketni, ikki boðar Umhvørvisstovuni frá, tá ið ein hitapumpuskipan verður tikin úr nýtslu, og um Umhvørvisstovan ikki fær oyðublað sendandi við upplýsingum sambært § 6 a, stk. 2.

Harafturat hevur uppskotið við sær, at tað nú verður revsað við bót, um
1) tað ikki er ein góðkendur installatørur av hitapumpu, sum hevur installerað hitapumpuna í hitapumpuskipanina, sbrt. § 9, stk. 3,
2) ein góðkendur installatørur ikki longur lýkur krøvini fyri at verða góðkendur, og hann ikki hevur latið Umhvørvisstovuni loyvið aftur, sbrt. § 9, stk. 5, 2. pkt.,
3) um eftirkanning sbrt. § 12, stk. 1 ikki fer fram eina ferð í hvørjum kalendaraári og

4) um eigarin av hitapumpuskipanini ikki kann skjalprógva eftirlitini í minsta lagi seinastu 5 árini, sbrt. § 12, stk. 2.

Í verandi lóggávu verða brot á hesar ásetingar eisini revsað við bót, men hetta er einans galdandi fyri jarðhitaskipanir í verandi lóggávu.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki við sær skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki við sær gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Uppskotið leggur ikki nakra generella skyldu á fólk. Kravt verður av teimum, ið fáa sær hitapumpur, at installatiónirnar skulu verða gjørdar av autoriseraðum fólki.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Uppskotið er fevnt av verandi áseting í upprunalógini, at landsstýrismaðurin kann áseta neyvari reglur fyri, hvørjar uppgávur installatørar kunnu gera, og um fakligu krøvini til installatørar.

Higartil hava kommunur kunna biðið um váttan fyri árligt eftirlit av jarðhitaskipanum. Eftir hesum uppskoti kunnu tær eisini biðja um slíka váttan fyri aðrar hitapumpuskipanir, størri enn 4 kW.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður, at uppskotið ikki hevur aðrar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**

*Til § 1, nr. 1.* Her verður yvirskriftin á lógini broytt. Orsøkin til broytingina er, at lógin verður broytt, soleiðis at hon fevnir um hitapumpuskipanir og ikki einans um jarðhitaskipanir.

*Til § 1, nr. 2.* Broytingin er ein teknisk broyting, grundað á, at lógin fevnir nú ikki einans um jarðhitaskipanir, men um hitaskipanir, bygdar á hitapumpur.

*Til § 1, nr. 3.* Í hesi áseting verða hitapumpur minni enn 4 kW undantiknar krøvunum í hesi lógini. Tó eru §§ 6 a, stk. 3 og 4 og 9, stk. 3 galdandi fyri hitapumpur, sum eru minni enn 4 kW. Smáar hitapumpur eru avmarkaður partur av samlaðu elnýtsluni, og tað kann hava neiliga ávirkan á áhugan at fáa sær smáar hitapumpur, um krøv, ið hava útreiðslur við sær, eru lutfalsliga høg í mun til nyttuna av smáum hitapumpum. Tó verður mett tryggast, at tað eru góðkendir installatørar av hitapumpum, ið seta pumpurnar upp.

*Til § 1, nr. 4.* Ásetingin lýsir, hvat hitapumpuskipan sambært hesi lóggávuni fevnir um.

*Til § 1, nr. 5.* Mett verður, at verandi allýsing av hugtakinum "vatnrætt hitaskipan" er ov ógreið. Endamálið við broytingini er at útgreina, hvat hugtakið fevnir um sambært hesi lóggávuni.

*Til § 1, nr. 6.* Teknisk broyting grundað á, at Umhvørvisstovan umsitur øki nú, ikki Jarðfeingi.

*Til § 1, nr. 7.* Teknisk broyting grundað á, at Umhvørvisstovan umsitur øki nú, ikki Jarðfeingi.

*Til § 1, nr. 8.* Málslig broyting.

*Til § 1, nr. 9.* Í § 6 a, stk. 1 verða sett krøv til góðkendar installatørar av øðrum hitaskipanum enn jarðhitaskipanum. Orsøkin til, at installatørurin skal útgreina hitatørvin, dimensionera hitaskipanina og útgreina nyttuna er, at tað hevur týdning fyri elnýtsluna, gagnið av skipanini og fíggjarliga skynsemið.

Í stk. 2 og 3. verður ásett, at oyðublað skal latast Umhvørvisstovuni, áðrenn farið verður undir at seta hitaskipanina upp.

Stk. 4 ásetur, at tað er ábyrgdin hjá eigaranum av hitapumpskipanini at senda oyðublaðið, sbrt. stk. 2 ella 3.

Sambært stk. 5 skal eigarin boða Umhvørvisstovuni frá, tá ið hitapumpuskipanir verða tiknar úr nýtslu. Ásetingarnar í § 6 a, stk. 2-5 eru m.a. grundaðar á tørvin at fáa til vega hagtøl um, hvussu nógvar hitapumpuskipanir eru virknar í landinum.
*Til § 1, nr. 10.* Teknisk broyting grundað á, at Umhvørvisstovan umsitur økið nú, ikki Jarðfeingi.

*Til § 1, nr. 11.* Málslig broyting.

*Til § 1, nr. 12.* Higartil hevur verið ásett, at Umhvørvisstovan skal góðkenna installatørar av jarðhitaskipanum. Hetta verður nú broytt, soleiðis at Umhvørvisstovan skal góðkenna installatørar av hitapumpuskipanum. Tvs. bæði installatørar av jarðhitaskipanum og øðrum hitapumpuskipanum.

*Til § 1, nr. 13.* Málslig broyting.

*Til § 1, nr. 14.* Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 12.

*Til § 1, nr. 15.* Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 12. Henda áseting er eisini galdandi fyri hitapumpur, sum eru minni enn 4 kW.

*Til § 1, nr. 16.* Her verður heitið á 3. kapitli broytt, soleiðis at hetta samsvarar við víðkanina av lógini og ásetingunum í kapitlunum.

*Til § 1, nr. 17.* Higartil hevur § 12 einans verið galdandi fyri jarðhitaskipanir. Við hesum verður ásetingin broytt, soleiðis at allar hitapumpuskipanir – tó ikki hitapumpur minni enn 4 kW - skulu verða eftirkannaðar av góðkendum installatøri av hitapumpuskipanum í minsta lagi eina ferð í hvørjum kalendaraári. Fyri at fáa besta gagn av hitapumpuskipanini er umráðandi, at skipanin verður regluliga eftirhugd.

*Til § 1, nr. 18.* Teknisk broyting, grundað á at ásetingin nú ikki einans fevnir um jarðhitaskipanir, men um allar hitapumpuskipanir.

*Til § 1, nr. 19.* Teknisk broyting, grundað á at ásetingin nú ikki einans fevnir um jarðhitaskipanir, men um allar hitapumpuskipanir. Kunngerðin verður broytt samsvarandi.

*Til § 1, nr. 20.* Tað er óheppið at vísa til eitt ávíst málaráð. Ístaðin fer nú bert at standa "landsstýrismannin", soleiðis at eingin ivi er um, at tað til eina og hvørja tíð er landsstýrismaðurin sambært málsøkjabýtinum, sum kærast kann til.

*Til § 1, nr. 21.* Her verður ásett, at brot á § 6 a, stk. 2 og 5 verður revsað við bót, um brotið er framt við vilja ella við grovum ósketni. Tað kann sostatt verða revsað við bót, um eigarin av eini hitapumpuskipan, sum ikki er ein jarðhitaskipan, ikki boðar Umhvørvisstovuni frá, tá ið ein hitapumpuskipan verður tikin úr nýtslu, og um eigarin ikki letur Umhvørvisstovuni oyðublað við upplýsingum sbrt. stk. 2, áðrenn hitaskipanin verður sett upp.

**Til § 2**
*Til § 2.* Her verður ásett, at lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsu- og innlendismálaráðið, xx. Xxx 2017

**Sirið Stenberg**
landsstýrismaður

/ Turid Arge
aðalstjóri

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: